



*Føroya Symfoniorkestur var mannað á konsertini hóskvøldið. Bæði yrkistónleikarar og onkrir útlendsir vóru við einasta føroyska symfoniorkestrinum, sum hevur heimavøll í Norðurlandahúsinum*



*Uppstillingin á pallinum í Norðurlandahúsinum á galla konsertini var einføld, men ógvuliga elegant.*

# Galla g

**Nakað av tí besta av tí besta innan føroyska mentan varð savnað í Norðurlandahúsinum hóskvøldið**

KONSERT
*Heri á Rógvi*

Alt við hesum vakra húsi er tignarligt og vakurt. Ein norðurlendskur miðdepil í Føroyum. Síðani 1983 hevur húsið hýst tiltøkum av øllum slag. Og ein rundur dagur verður eisini hildin á einari tílíkari mentanarháborg.

Fyrr um dagin var kjak fundur á skránni, har litið varð aftur í tíðini, hvat varð sagt tá, og hvør veruleiki var komin burturúr spádómunum.

Eitt kjak, sum lesararnir kunnu lesa meira um í Sosialinum týsdagin.

Og um kvøldið var ein rættilig galla konsert á skránni. Ein ultra innboðin fjøld var komin saman í húsinum sjálvan hátíðardagin.

Einki varð sent í útvarpi ella sjónvarpi, so tað vóru vit bara vit, sum vóru innboðin ella høvdu fingið fatur á einum av avmarkaðu atgongumerkjunum til sølu, ið fingu upplivingina við.

Tað merkist eisini, at hetta vera eitt serligt høvi. Fólk komu til tíðina, og tey betru klæðini vóru funnin fram. Tað er nakað mystiskt næstan fremmant við hesum galla tiltøkunum. Uttanlands eru tað fín tiltøk oftast fyri tey fínu. Í Føroyum er henda stættin rein fiktión, og tað er kanska heldur ikki so galið. Men hetta tiltakið eigur kortini størri rós enn landsdystirnir og annað, har elitan verður vald út og hevja upp eftir ókendum formlum.

Tí hetta húsið eiga vit øll. Soleiðis sigur stjórin í húsinum um húsið og virksemið. Og týdningarmikið er at hava í huga, at húsið er eitt norðurlandahús – og ikki eitt Føroya hús ella eitt hús fyri Havnina.

Og vit eitt sovorðið serstakt og sjálsamt høvi sum henda mátmikla galla konsert, so kunnu tað so avgjørt seta spurnartekin við, um ikki fleiri áttu at fingið gleðina av hesari góðu løtu. Tær eru jú so fáar.

Hetta hóskvøldið í Norðurlandahúsinum hevði meira enn nakað ein ávísan stíl. Og her verður ikki hugsað um talurnar ella búnarnar hjá áhoyrarunum, men um framførslurnar.

Húsið skal skapa karmar og mentanina, og er tað ikki frálíkt at eiga slíkt hús til slíka mentan. Framførslurnar fríggjakvøldið vóru á góðum máli stílfullar. Hetta er einki ummæli, men bara ein einføld konstantering.

Við slík høvi verður oftani róst ríkiliga nógv, og vit skulu heldur ikki leggja